# Skulu leggja trumfarnar á borðið fyri at fáa eina góða avtalu við ES

**Eftir eina ferð í Brússell, er formaðurin í uttanlandsnevndini meiri sannførdur enn nakrantíð um, at tað er ørskapur hjá føroyingum at gerast limir í ES**

FØROYAR OG ES
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er ørskapur hjá føroyingum at melda seg inn í ES. Tvørturímóri eiga vit at brúka sterku støðuna, vit hava, til at fáa ein sersáttmála við Evropasamveldið.

Tað er formaðurin í uttanlandsnevndini hjá Løgtinginum minst líka sannførdur um í dag, sum hann var fyri eini viku síðani.

Uttanlandsnevndin hjá Løgtinginum hevur júst verið í ES -Høvuðsborgini, Brússel á eini kunningarferð. Og nú nevndin lendi aftur í Føroyum mikudagin, kann formaðurin í nevndini, Hergeir Nielsen, líta aftur á nakrar sera upplýsandi og læruríkar dagar í belgiska høvuðsstaðnum.

– Hetta var ein sera upplýsandi ferð, har vit fingu innlit í nógv ymisk viðurskifti.

Hergeir Nielsen sigur, at á ferðini hitti uttanlandsnevndin umboð fyri EFTA, íslendingar og sveisarar, sum hava gjørt av at standa uttanfyri ES, men sum hava eina seravtalu við ES, tí teir halda, at tað gagnar teimum betri. Harumframt hitti nevndin danir, sum arbeiða við fiskivinnupolitikkin hjá ES og onnur.



*Verða vit limur í ES, missa vit ræðið á okkara fiskiríkidømi. Og tað hevði verið ørskapur at slept tí, tí tá hava vit mist alt, sigur Hergeir Nielsen, sum mikudagin kom aftur úr Brússel, saman við uttanlandsnevndini*

Sjálvur heldur Hergeir Nielsen at hetta var ein ógvuliga gagnlig og upplýsandi ferð, nú Løgtingið seinni í ár skal hava orðaskifti um viðurskifti okkara við ES.

Tilknýti okkara til ES verður ein av teimumn heilt stóru uttanríkispolitisku spurningunum, sum Løgtingið kemur at taka støðu til.

Og Hergeir Nielsen er sannførdur um, at vit eiga ikki at drála við at gera okkara støðu greiða.

– Tíðin bróytist alsamt. Eygleiðarar í Brússell meta, at longu um eini tvey ella trý ár er Noreg limur í ES og tað er eisini alneyðugt at hjá okkum at gera støðuna upp og at gera greitt, hvat vit sjálvir vilja, sigur formaðurin í uttanlandsnevndini.

– Ikki minst hevur tað týdning, at vit ongantíð ov tíðliga gera greitt, hvat vit ætla við ES, nú útlit eru fyri, at Danmark kanska endar heilt innanfyri í einum felags uttanríkis- og verju- og trygdarpolitikki hjá ES.

– Tað eru stórar broytingar fyri framman og tá mugu vit føroyingar vera fyrireikaðir og at gera okkum greitt, hvat vit sjálvir vilja, sigur hann.

Tað hevur verið sagt við hvørt, at fer Noreg uppí ES, hava vit í veruleikanum onki

### Ørskapur

Spurningurin er so, hvat tað rætta fyri føroyingar eru?

Sjálvur er formaðurin í uttanlandsnevndini ikki í iva og eftir ferðina í Brússel er hann enn meiri sannførdur.

– Tað er ørskapur fyri okkum at gerast limur í ES. Hergeir Nielsen sigur, at verða vit limur í ES, er tað óhugsandi at vit sjálvi varðveita ræðið á okkara fiskiríkidømi.

– Tað vildi ørskapur at slept ræðinum á okkara fiskiríkidømi og lagt tað upp í hendurnar á ES. Í fiskivinnupolitikkinum hjá ES er staðfest, at øll limalondini hava felags atgongd til fiskiríkidømi hjá øllum londunum.

Hergeir Nielsen sigur, at kanska ber tað til hjá einum limalandi at fáa seravtalur um sítt egna fiskivinnuríkidømi í eina tíð. Men vit hava onga trygd fyri, nær ES ikki góðtekur eina slíka seravtalu longur. Verða vit fyrst limur í ES, hava vit onga samráðingarstøðu sum ger, at vit kunnu krevja at varðveita ræðið á okkara fiskiríkidømi.

– Og tann dagin, vit hava mist ræðið á okkara fiskiríkidømi, hava vit mist alt, leggur formaðurin í uttanlandsnevndini afturat.

Hergeir Nielsen heldur tvørturímóti, vit eiga at brúka teir trumfar vit hava til at fáa okkum ein sersáttmála við ES.

Og onkrar virðismiklar trumfar heldur hann, at vit hava.

– Vit hava stórt fiskiríkidømi, samstundis sum ovurstórt trot á fiski er í ES. Samdundis liggja vit sera væl fyri mitt í Atlantshavi. Ikki minst hermálsliga liggja vit sera væl fyri og tað er eisini ein støða, vit eiga at hámeta og brúka mótvegis umheimin um at fáa ymsar handilsligar og aðrar fyrimunir.

– Sostatt hava vit eina ikki hampiliga sterka samráðingarstøðu, sum vit kunnu brúka og tað eiga vit eisini at brúka eini komandi telving við umheimin um ein sersáttmála, sigur Hergeir Nielsen.

Hann leggur afturat, at tað er altso ikki bara ES til, tí tað er eisini ein heimur uttanfyri ES.

# Piltar hertaka Sevmýri

**Í morgin skipa piltarnir hjá TB fyri stórum tiltaki úti á fótbóltsvøllinum og í TB húsinum**

TILTAK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í morgin verður Sevmýri á Tvøroyri karmurin um eitt stórt tiltak, sum piltarnir hjá TB skipa fyri.

Tað verður mestsum allan leygardagin, frá klokkan 15 seinnapartin, til langt út á náttina, at Piltarnir hertaka Sevmýri við ymsum tiltøkum.

Fyrsta tiltakið á skránni er klokkan 15, tá ið neytamykjukapping verður á fótbóltsvøllinum á Sevmýri. Har er høvuðsvinningurin ein oksi úr Øravík, men tað eru eisini 10 aðrir vinningar at vinna, eitt nú lamb, gás, dunnur, kaffimaskina og sodavatn.



*Hetta eru piltarnir, sum royna at savna sær pening saman til eina uttanlandsferð næsta summar, har teir fáa eitt upplivilsi fyri lívið. Leivur Nygaard hevur tikið myndina av teimum úti á vøllinum á Tvøroyri*

Klokkan 15.30 verður tiltak í TB húsinum, har ein gandakallur og ein búktalari frá Octopus fara at undirhalda. Atgongumerkið til tað framførsluna kostar 40 krónur.

Leygarkvøldið frá klokkan 20 til 23 verður barnadiskotek í TB húsinum og aftaná tað sleppur ungdómurin framat, tí tá verður vanligt diskotek í TB húsinum, har Stifttonn skipar fyri tónleikinum.

### Góðar vónir

Poul F, sum er ein av venjarunum hjá teimum ungu spælarunum hjá TB, sigur, at piltarnir royna at savna sær pening saman til eina stóra uttanlandsferð næsta summar.

Og alt, sum kemur inn á hesum tiltakinum í morgin, skal brúkast til hesa ferðina.

– Talan verður tilsamans um 25 piltar, sum skulu uttanlands at vera við í eini stórari fótbóltskapping ið nevnist Copenhagen Tivoli Cup.

Hetta verður eitt upplivilsi fyri lívið hjá piltunum, tí talan er um eina ógvuliga stóra kapping, har spælarar úr einum 20 londum úr øllum heiminum hittast.

Poul F hevur annars góðar vónir um framtíðina hjá TB, tí tað hevur hilnast væl hjá teimum ungu. Í ár vunnu piltarnir økisbólkin og nakrir av teimum hava framvegis aldur at vera við í piltunum næsta ár. Í fjør gjørdust hesir somu dreingir føroyameistarar hjá smápiltunum.

Og smápiltarnir í ár, teir, sum verða piltar næsta ár, vórðu nummar tvey í ár.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Pól á Kletti 25 ára starvsdag

1. oktober vóru tað 25 ár síðani, at Pól á Kletti byrjaði sum blaðmaður á Dimmalætting.

Dimmalætting húsaðist tá í Erling Jalsgøtu, og umstøðurnar vóru ikki at líkna saman við tær, sum nú eru á Smyrilsvegi, har blaðið hevur hildið til nógvu seinastu árini.

Pól á Kletti heldur, at ein av størstu hendingunum í síni tíð á Dimmalætting var, tá ið nýggja blaðhúsið var tikið í nýtslu í 1985.

Tá ið Pól kom í starv, var hann fjórða blaðfólkið á Dimmu, men í dag starvast fleiri enn fimmti fólk á blaðnum.

Pól hevur røkt ymsar uppgávur á Dimmalætting, men síðani 1996 hevur hann staðið fyri Skáanum, sum er serligt vikuskiftisblað í Dimmu. Pól hevur eisini verið við í arbeiðnum at fáa nógvar bøkur út.

Fríggjadagin 3. oktober verður almenn móttøka í sambandi við 25 ára starvsdagin. Móttøkan verður á Dimmalætting millum kl. 15.00 og 17.00.



*Pól á Kletti hevur verið blaðmaður á Dimmalætting í 25 ár. Hann hevur røkt ymsar uppgávur á blaðnum, men síðani 1996 hevur hann staðið fyri Skáanum, sum er serligt vikuskiftisblað í Dimmu*

### Dagurin

**3. oktober. Metta.** Teir vita ikki um nakra halgikvinnu við hesum navni. Navnið er *Margreta* stytt.

## Justinus Michael Fr. Justinussen (Jutt)

**føddur 24. november 1916**
**deyður á Mikkjalsmessu 29. september 2003**



Hann var elsti sonur Anniku úr Yvirstovu og Olivur, bónda Uppi í Húsi. Pápin doyði longu í 1924, so mamman sat við festinum Uppi í Húsi, til Jutt kundi festa tað. Seinni fekk hann eisini Yvirstovufestið aftaná mammubeiggjan Sivart, sum doyði í 1957 og sum var ógiftur.

Í dag hevur bróðursonurin Regin bæði festini.

Í 1963 giftist hann við Petru, dóttir Mikkjal Olsen, Úti á Bø, og Malenu, dóttir Miðlinga-Símun úr Gulakstovu úr Svínoy.

Stutt var ímillum hjúnini. Petra, sum var fødd í 1920, doyði stutt fyri jól í fjør.

Brøðurnir hjá Jutt vóru Poul (á Fuglberg), d. 1 mei í ár, giftur við Betti, og Karl, sum doyði í 1972, giftur við Thurid. (sí Poul á Fuglberg)

Systkini hjá Petru vóru Rasmus í Sjóvinnubankanum, Símun, John, Marin Katrina, Els-Malena, gift við Rósing Rasmussen. (síða 29 hjá Símun Hansen II).

## Skálabeiti misti ein mikladalsálitismann

# Til minnis um Johannis Østerø

Góði Johannis granni.

Ólavur prestur lýsti tín áhuga fyri náttúruni so vakurt. Tín áhuga fyri øllum livandi, líka frá torvatrøllum til kaninir. Alt skuldi fáa frið og sleppa at liva sítt egna lív.

Sjálvur fekst tú eina lagnu, sum mangir aðrir føroyingar – tíverri – máttu ígjøgnum.

Minnist tá vit sótu í kjallaranum, eg rópti teg inn at frætta frá læknatúrinum, tú hevði verið til niðri í Danmark fyri einum ári síðani. Tú segði sum var, tá lækni segði: »Der sidder du, din bastard…«, tá hann konstateraði tarmkreftina, sum knekkaði teg 25. juni íar, 49 ára gamal. Men, segði tú, eg var heilt niðri á botni teir fyrstu dagarnar eftir »dómin«. Men, sigur tú so aftur, hví kann tað ikki raka meg sum so mong onnur?

Hatta var tín uppfatan av tilveruni. So var bara at bíða. Tað var ein ræðulig tíð fyri okkum grannar og ikki minst fyri tykkum Elinborg, Lív og Monu, at síggja dagamunin.

Sum pápi var tú professionellur. Tú legði mær stovugólvið á tá í 1980-unum, og sjálvandi var Lív við tær. Sum heilt lítil vildi hon vildi ikki sleppa pabba út har uttanfyri, uttan hon kom við. Og bleiv Johannis kanska nakað leingi við hamaranum, kundi Lív taka hamaran, meðan pausa var, og loypa avstað út við honum, tí hon vildi hava pabba út aftur, út til tey sjálvs.

Men, vinurin, (tað var slagorðið), tolin sum altíð og fyri frið skyld, ja, so fór Johannis bara aftaná. – Eg komi aftur í morgin, vinurin, var svarið. Men gólvið fingu vit so liðugt. Seinni var altanin á skránni. Har var Johannis eisini hollur ráðgevi hjá mær.

Ein mønustingin fekst tú, tá tit, John Gaard og tú (kanska Ellingsgaard var við eisini) skiftu takið hjá Dudduni her í grannalagnum. Djarvur sum mikladalsmenn enn eru, stóð stigin nakað uttarlaga á trappusteininum og fór út av við tær í og tú endaði á asfaltinum standandi ella sitandi. – Foy for den …, hugsaði eg, tá eg sá tað. Og er eri bangin fyri, at tað var mønubresturin til liðagiktina o.s.fr.

Í einari VB-skrá undan einum dysti bleiv Hans Michael spurdur um, hvør var stuttligasta menniskja, hann hevði møtt. – Johannis Østerø, var greiða svarið. So nú eru vit tann humorin fátækari. Men grannalagið má so halda fram í Johannisar anda – onki at tosa um annað.

Eg veit um eina gullnál, Jóhannis hevur fingið her á garðinum. Sum áður sagt, altíð djarvur, leyp hann í Skálá eftir at Beinir, sum var komin at vitja ommuna saman við Bartal, sum tá bert var 2 ár.



Beinir leyp inn til Johannis og forpøstur segði: Beiggi mín er dottin í ánna, og Jóhannis leyp, illa var framkomandi, við tí úrsliti, at okkurt rivjabein mátti lúta. Tá lá hesi lítli 2 ára gamli á búkinum í einum hyli. Hann fekk hann upp á áarbakkan og byrjaði at arbeiða uppá hann til Anna, mamma tann lítla Bartal, kom til og fekk vatnið úr honum. Tá var Jóhannis veruliga illa fyri eisini. Men lív kom í aftur lítla og fyri hetta bragd hevur Gullhornið v/ Leif Niclassen valt at lata Jóhannisi og Beinir hesa flottu nál, hetta varð gjørt á einari vørustevnu í Ítróttarhøllini fyri nøkrum árum síðani, og tøkk fáið Gullhornið fyri tað.

At ringja eftir sangarum til jarðarferðir vóru Johannisar tungu boð, men altíð møttu vit: – Nú, vinurin, so eru aftur boð eftir okkum. Soleiðis gekk, til vit sjálvir noyddust at taka okkum saman at syngja »Herrens venner, ingen sinde, mødes skal for sidste gang« … … Ja, ja …

Segði við Monu yvir í kirkjugarðinum, at nú hevði pabba tað gott! – Ja, segði hon, og var líkasum frígjørd fyri ta ræðuligu pínu, pápin hevði havt ta síðstu vikuna.

Jú, vit vóru av sonnum lætta – eitt sindur. Tí at síggja fjøruna, sum nú var komin til kyrrindi, var ein lætti hjá Johannisi – og Elinborg eisini. Johannis er nummar 472 av »vágbingum«, sum eru grivnir í nýggja kirkjugarði, og minnast vit teir allar/tey øll. Tað hevði verið ein øgilig gonga at sæð – øll komið gangandi gjøgnum Líðina og yvir um aftur sandin. Tað kann bara hugflogið sera í gongd!

Nú tá tað fjaraði meira út segði eg við Elinborg tann eina dagin (ein av teimum allar seinastu) hon for norður á Tvøroyri at heilsa uppá, spyr hann um altanina, nú vit endurnýggjaðu hana. – Jú, segði Jóhannis við veikari rødd, noy, tað bleiv tað onki burtur úr á hesum sinni. Men hansara góði samarbeiðspartnari frá fyrr, John Gaard, teir báðir arbeiddu saman nógv, nógv ár, kom so okkum til hjálpar og tað var Jóhannis glaður fyri.

Ein heiðurligur mikladalsmaður, djarvur og knáur, og ein ektaður »vágbingur« er nú farin handan sýn.

**Peter**